# Sjófuglurin kann minka burtur í einki

**Ternan er í minking. Talið av lomviga og álku er farið niður við 70%. Haraftrat verður nebbasild fiskað uttan avmarkingar.**
**- Hetta eru alt viðurskifti, sum vísa at neyðugt er við álvarsomum tiltøkum í Norðurhøvum til tess at verja havumhvørvið og sjófuglin, sigur norðurlendsk umhvørvisfólk.**

NÁTTÚRA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Fuglalív: Hetta álvarsmálið hava teir norðurlendsku umhvørvisverndarfelagsskapirnir sæð. Og teir vilja eisini fegnir gera vart við støðuna.

Í eini yvirlýsing eftir fund teirra í Føroyum koma teir við eini greiðari áheitan á Norðurlendska Ráðharraráðið um at greina út, hví talið av sjófugli minkar.

- Út frá hesum ynskja vit eisini at uppskot verða gjørd til at steðga hesi gongdini, siga millum onnur føroyingurin, Kári Thomsen sum umboðaði Føroya Náttúruverndarfelag á fundinum herfyri.

Hetta kann gerast við at ein bólkur við serfrøðingum verður settur og sum skal koma við tilráðingum til tingsetuna hjá ráðharraráðnum, sum byrjar á heysti 2007.

Hinir luttakararnir á ársfundinum vóru úr Danmark, Finlandi, Álandi, Noregi og Íslandi.

### Eingin terna

Norðurlendski felagsskapurin viðgjørdi á ársfundinum støðuna hjá sjófuglinum við Føroyar.

- Eins og í øðrum londum er talan um eina ógvusliga afturgongd hjá fleiri av hesum fuglasløgum, sum verða útsett fyri umhvørviseitri og føðineyð.

- Fyri okkum er hetta eitt greitt tekin um álvarsomu gongdina í øko-skipanini, verður sagt í yvirlýsingini.

Víst verður á stóru afturgongdina hjá álkuni og lomviganum. Hesa gongdina sær ein eisini aftur í øðrum fuglasløgum í Norðurnoregi, Íslandi og Grønlandi. Orsøkin til hetta er í stóran mun tørvandi føði.

Norðøkið er eisini nógv rakt av fylgjunum av umhørviseitran. Finskir granskarar eru komnir fram til, at likka hevur so stórar nøgdir av eitri í sær, at pisurnar kunnu ikki upptaka føðsluna og doyggja tí.

Ternan er minkað við 30 % við Føroyar seinastu 20 árini. Komið er somuleiðis fram til, at ternan verpur nú tríggjar vikur seinni enn vanligt, - um hon yvirhøvur ger tað.

Úr Noregi fræ ttist um at ternan fer frá reiðrinum eftir at hava vorpið. Fylgjan av hesum er, at ungin doyr og at ein í dag hevur heil fylki har ein ikki sær ternu.



*Sjófuglurin við Føroyar er í afturgongd, og neyðugt er við álvarsomu stigum skal gongdin vendast*

# Havn og tunnil á fíggjarlógina

Svínoy: Samstundis sum menn vóru í ferð við at gera dýpdarmátingar út fyri oynni, sendi bygdarráðið eitt skriv til løgtingið. Skrivið snúði seg um kanning av møguligum tunli og eisini nýggjari atløgubryggju á einum staði, tey nevna Yviri í Havn.

Í hesum brævi heitir Svínoyar bygdarráð enn einaferð á løgtingið, fíggjarnevndina og vinnumálastýrið um at seta pening á komandi fíggjarlóg so arbeiðið kann fara í gongd.

Í brævinum sum er dagfest 18. juli skrivar borgarstjórin, Eyðun Jacobsen, at forkanningarnar hjá Landsverki vóru um at verða lidnar, so at ein kostnaðarmeting av arbeiðinum nú kundi fyriliggja.

Landsverk hevur annars síðani í august mánaði í fjør kannað bæði streymog alduviðurskifti, og í farna mánaði vórðu dýpdarmátingar gjørdar.

Gongst sum ætlað verða eitt forprosjekt og tilmæli liðugt í november mánaði.

**sb.**



*Svínoyingar ynskja sær betri ferðasamband og betri havnaviðurskifti*

## Írar vitja samkomur kring landið

Møtir: Seinni í hesum mánaðinum koma tveir írar higar at vitja í ymiskum samkomum kring landið.

Talan er um teir báðar Graham McCartney og Brendan McClaud, sum hava tað sum sítt kall at vitja tey londini, sum hava krossmerkið í fløggum teirra.

Søgan greiðir frá írum, sum løgdu frá landi sum trúboðarar, og komu við smáu bátum sínum m.a. til Føroyar. Sagt verður, at teir bóðu vind Heilaga Andans leiða teir hagar sum hann vildi.

Nú koma tveir írar aftrat higar, væl at merkja við nútíðar flutningsmøguleikum, men kortini sama boðskapinum. Teir fara at vitja samkomur í Sørvági, Vestmanna, Havnini, Hoyvík, Miðvági, Klaksvík og í Skopun. Vitjanin byrjar 18 august og endar 27. august.

**sb**

## Dagtilhaldið heldur fram

Strendur: Undirtøkan fyri dagtilhaldinum á Strondum hevur verið sera góð, - so góð at tað fer at halda fram árið út.

Bygdaráðið setti á stovn hetta tilhaldið í vár og var ætlanin tá, at tað skuldi royndarkoyrast fram til 1. juli. Nú skilst, at undirtøkan millum fólkið hevur verið so mikið góð, at dagtilhaldið fer at halda fram heilt til 31. desember í ár.

Sjóvar kommuna hevur leigað sonevndu Pensjónistahúsini til hetta tiltakið. Endamálið er at fólk skuldu kunnu koma saman at hugna sær og gera ymiskt saman, soleiðis at tey kunnu mennast og fáa økt lívsvirði.

Tað letur til, at tað er júst hetta sum er hent hesa tíðina.

**sb.**